ÍTRÓTTARBLAÐIÐ
Sosialurin 20. oktober 2009



# Hugburðurin skal broytast

Føroyska kvinnulandsliðið vann tríggjar av fýra dystum móti Grønlandi. Men enn er langt eftir á mál, staðfestir venjarin, Claus Rasmussen
Mynd: Álvur Haraldsen

**FAKTA**

**Dystirnir í farnu viku:**

| | | |
|---|---|---|
| Føroyar U21 – Grønland | 25-24 | Høllin á Hálsi, Tórshavn |
| Føroyar U21 – Grønland | 21-23 | KÍ-høllin, Klaksvík |
| Føroyar U21 – Grønland | 29-23 | Høllin á Hálsi, Tórshavn |
| Føroyar U21 – Grønland | 25-23 | Høllin á Hálsi, Tórshavn |

**- Hondbóltur er nógv meira enn sjálvt spælið. Tað ræður um at verða úthvíldur og væl fyri til venjingarnar. Og tað er uppgávan hjá gentunum, sigur Claus Rasmussen, sum er glaður fyri frálíku úrslitini hjá U-21 landsliðnum móti Grønlandi í farnu viku**

uni@sosialurin.fo



Uni Holm Johannesen

- Trupulleikin er fyrst og fremst í feløgunum. Tí við einum øðrvísi hugburði kann føroyskur kvinnuhondbóltur gera risa framstig.

Føroyska U21-landsliðið hjá kvinnum prógvaði í farnu viku, at tær kunnu standa seg á altjóða palli. Við trimum sigrum av fýra møguligum móti grønlendska landsliðnum hevur byrjunarskotið til stóra arbeiðið við ungdómsliðnum ljóðað. Skipari á skútuni er Claus Rasmussen, sum longu biðjur feløgini um hjálp. Tí verkætlanin skal lyftast í felag.

## Feløgini taka ábyrgd

Claus Rasmussen og hondbóltssambandið hevur sett sær stór mál. Føroyskur kvinnuhondbóltur skal mennast. Ætlanin er løgd, og tá skulu feløgini syrgja fyri, at leikararnir eru væl fyri kropsliga.

- Feløgini mugu taka ábyrgd á hesum økinum. Um genturnar hava styrkivenjing og eru væl fyri kropsliga, fer støðið at hækka alt fyri eitt. Tí skulu feløgini syrgja fyri, at genturnar lúka venjingartreytirnar. Tað fer eisini at loysa seg, tí útlendingarnir eru, sæð burtur frá kropsliga partinum, ikki nógv betri enn føroysku genturnar, sigur Claus Rasmussen.

Men er tað realistiskt, at feløgini taka hesa uppgávuna á seg?

- Sjálvsagt. Tað er at seta ein venjara, sum tekur sær av hesum í fleiri aldursbólkum. Trupulleikin er ikki størri enn so. Men genturnar mugu eisini taka í egnan barm. Tí hondbóltur er nógv meira enn sjálvt spælið. Tað ræður um at verða úthvíldur og væl fyri til venjingarnar. Og tað er uppgávan hjá gentunum, greiðir hann frá.

## Framtíðin er bjørt

Tí útlitini fyri, at føroyskur kvinnuhondbóltur skal standa væl í altjóða kappingum eru sera góð. Tað metir í øllum førum Claus Rasmussen, sum ikki hevur hug at seta nøvn á nakrar einstaklingar.

- Sum ein heild stóðu vit okkum sera væl. Allar prógvaðu sítt virði, og tað er gleðiligt hjá okkum, sum skulu taka hópin út. Vit eru sera væl nøgd við avrikið, staðfestir Claus Rasmussen.

Hann er serliga fegin um, at genturnar vístu vilja og ágrýtni. Og hóast venjing var á skranni fyrrapart og dystur seinnapart, hildu tær fram at stríðast.

- Framstigini vóru sjónlig. Serliga, um vit samanbera fyrsta og seinasta dystin. Flott, eru rósandi orðini frá venjaranum.

## Stórar avbjóðingar fyri framman

Claus Rasmussen fer komandi mánaðirnar at eygleiða genturnar nærri. Landsvenjarin fer at fylgja við gongdini hjá einstøku leikarunum, og millum jól og nýggjar skal hópurin samlast aftur.

Í februar kemur danska U18-landsliðið, sum er nýkosin evropameistari, á vitjan í Føroyum. Seinni út á várið er Challenge Trophy á skránni. Og í komandi summar fer føroyska liðið ætlandi til Grønlands at royna seg móti teimum eina ferð enn.

- Vit hava eisini møguleika at taka lut í undankappingum til endaspøl. Men tað er ikki á skránni enn. Nú royna vit fyrst á fáa ferð á ungdómsarbeiðið, og vónandi prógva vit, at vit kunnu stríðast við tær bestu, sigur bjartskygdi Claus Rasmussen, venjari á U21-landsliðnum.

# Frakland og Írland hittast

**Stóra brakið í play-off dystunum verður millum Frakland og Írland**

FIFA kastaði í gjár lut um, hvussu tvey´ararnir í europiska partinum av undankappingini hittast í play-off dystum.

Í undankappingini var skipanin soleiðis, at allir vinnararnir av europisku bólkunum spældu seg beinleiðis víðari.

Tvey´ararnir í teimum átta bólkunum skulu síðani spæla um pláss í Suðurafrika, og hesi hittast soleiðis:

Írland-Frakland
Portugal-Bosnia/Herzegovina
Grikkaland-Ukraina
Russland-Slovenia

Londini spæla bæði úti og heima, og skulu dystirnir spælast 14. og 18. november.

**mørk**